# ítróttur

Nr. 36 • leygardagur • 21. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Neistabreiddin skal royna seg

**Tað líkist einum sera skerdum Neista-liði, sum sunnudagin skal royna at halda taktina hjá Kyndli í odda-stríðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað kann væl gerast ein avgerandi løta hjá Neistanum, nú teir við skerdari manning skulu takast við VÍF, sum kanska er ávegis úr aldudalinum, sum liðið hevur verið í hetta kappingarárið*

Soleiðis sum hondbólts-kappingin hevur lagað seg, so bendir alt á, at gull-stríðið verður ein kapp-renning millum Neistan og Kyndil.

Havnarfeløgini bæði hava alt árið verið við til at mynda oddin, og eftir sigurin hjá Kyndli á StÍF seinasta vikuskiftið, tykjast hesi bæði eisini vera um at toga seg eitt sindur leys av hinum.

### Møguleikin hjá VÍF

Hjá Neistanum hevur lagið verið sera gott, síðani teir fyri trimum vikum síðani vunnu stórsigur á grannunum, og tosið hevur í nógvar mátar bent tann vegin, at nú skuldi meistaraheitið aftur vinnast, men hetta tagnaði tó í vikuni.

Fyrst stóð greitt, at Heini Hanusarson helst meiddi seg so illa í dystinum móti KÍF, at hann í øllum førum má binda frið í nakrar vikur, og tá so Dragisa Stojovic eisini fekk skaða undir venjing í vikuni, fór av álvara at síggja svart út. Júst hesir báðir leikararnir hava av bakkinum verið artillaríið hjá Neistanum, og tó at maður oftani kemur í mans stað, so tykist ilt at síggja, hvaðani Neistin skal fáa hesar. Ikki minst tá Karl Oddmar Rasmussen helst er burturstaddur sunnudagin.

Hinvegin gevur tað so øðrum leikarum møguleika at royna seg. Áki Mørk hevur fyri tað nógva spælt á miðjuni, men hann kann kanska flytast á vinstra bakk, meðan Dann Thorleifsson tekur yvir hinumegin, men spurningurin er kanska, hvørt hetta røkkur móti VÍF.

Tí gamaní upplivir hondbólturin í Vestmanna í løtuni sína størstu kreppu í fleiri ár, men enn eru heiðursmerki tó væl og virðiliga í eygsjón. Og seinni hálvleikur móti H71 gav kanska part av vantandi sjálvsálitinum aftur, soleiðis at liðið nú fer at sýna nakað av tí, sum hevur tryggjað teimum ovastu sessirnar í føroysku kappingini seinastu nógvu árini.

### Hoyvíkarhøllin kann órógva

Tveir aðrir dystir verða leiktir um vikuskiftið, og felags fyri hesar er, at teir báðir verða leiktir í Hoyvíkarhøllini.

Leygardagin vitjar StÍF hjá H71 í eini endurtøku av steypafinaluni, og skal hendan brúkast sum barometur, so er einki at ivast í, at strandingar eiga at ogna sær stigini. Ikki minst tá hoyvíkingarnir eisini eru nakað skerdir, nú Jákup á Borg aftur er farin undir fótbóltin.

Hinvegin hava hoyvíkingar áður sýnt, at teir altíð kunnu gera okkurt óvæntað, og spurningurin er so bara, um strandingar verða offur fyri hesum serliga hoyvíkarfyribrigdinum hesaferð, ella um tað bíðar til okkurt av hinum »stóru« liðunum kemur at vitja.

Sunnudagin skal so Kyndil seg í somu høll, tá teir vitja KÍF. Kyndil hevur ikki víst tey mest sannførandi avrikini seinastu vikurnar, og skaðar og onnur frávera hava eisini argað heilt nógv.

Hesaferð er Hans Áki Dal-Christiansen tó aftur tøkur, og tað er í øllum førum eitt stórt pluss. Spurningurin er so, hvørt fingurin hjá Jacobi Jónsson og økslin hjá Finni Hansson fara at loyva teimum at hava nakran serligan leiklut.

Kollfirðingar hava tó fleiri ferðir í ár framt rættiliga góð avrik á heimavølli, og tó at stigini ikki eru vorðin so øgiliga nógv í tali, so hevur oftani resta lítið í, og tað plagar í øllum førum ikki at vera nakar vani hjá teimum at leggja seg niður, »bara« tí eitt av ovaru liðunum kemur á vitjan. So tað er einki at ivast í, at Kyndil skal arbeiða fyri sakini, um teir vilja hava stigini við sær oman aftur á Háls.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 21.02 | 14.30 | VB-StÍF | Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen |
| 22.02 | 14.30 | Neistin-VÍF | Hannis Wardum & Uni Wardum |

**1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.02 | 17.30 | H71-StÍF | Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen |
| 22.02 | 16.00 | Neistin-VÍF | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 22.02 | 16.00 | KÍF-Kyndil | Kristian Johansen & Sámal Hansen |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.02 | 14.00 | KÍF-Dráttur | TB |
| 22.02 | 14.00 | Fleyr-ÍF | KÍF |
| 22.02 | 14.00 | Mjølnir-TB | KÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.02 | 16.00 | Fram-SÍ | Mjølnir |
| 22.02 | 16.00 | Fleyr-ÍF | Mjølnir |



# Gulldystur í Klaksvík

**Enn kann Dráttur órógva, men alt bendir á, at vinnarin av kvinnudystinum í Klaksvík fer at standa við gullinum eftir kappingarlok**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tey ikki áttu umboð í nøkrum av steypafinalunum, so hevur flogbólturin í Klaksvík tað gott í hesum døgum.

Vikuskiftið undan steypafinalunum leiktu menninir móti ÍF, og har eydnaðist at toga ein sigur heim, sum kann vísa seg at gerast gull verdur. Hetta vikuskiftið eru tað so kvinnurnar hjá Mjølni, sum eiga tørn, og aftur hesaferð bendir alt á, at talan er um ein dyst, har vinnarin um knappan mánað kann rópa seg føroyameistara.

Steypavinnararnir úr TB hava saman við Mjølni myndað oddin í landskappingini alt árið, og eftir heimasigur í Trongisvági bendi alt á, at TB skuldi fara avstað við gullinum í landskappingini, men ein ósigur fyri Drátti koppaði brádliga øllum á høvdið. Mjølnir og TB eru nú jøvn í stigum, og tí fær vinnarin sunnudagin ein fyrimun, sum væl kann vísa seg at blíva avgerandi.

Sjálvandi kann Dráttur framvegis argað, og tær hava bæði heima móti Mjølni og úti móti TB eftir á skránni, men hóast hesir báðir skuldu givið fulla úrtøku, so røkkur tað tó ikki til samlaðan sigur, uttan so at vinnarin sunnudagin eisini missur aðrastaðni. Nakað sum í verandi støðu tykist óhugsandi.

Tí bendir alt í løtuni á, at tað verður vinnarin sunnudagin, sum fer at standa við so nógv teimum sterkastu kortunum á hondini undan endaspurtinum, og tað er ein leiklutur, sum bæði Mjølnir og TB tráða eftir, og sum báðir partar fara at leggja seg eftir sunnudagin.

### Finalutaparar í Hoyvík

Hjá kvinnunum eru tveir aðrir dystir á skránni um vikuskiftið. Leygardagin skal Dráttur reisa seg eftir tapið í steypafinaluni, tá tær vitja í Hoyvík, har KÍF eigur heimavøll.

Einki er at ivast í, at Dráttur er stórfavorittur at vinna hendan dystin, og tann leiklutin mugu tær hjá ÍF eisini átaka sær, tá tær vitja hjá Fleyr sunnudagin. Fleyr hevur tó gjørt onkran vørrin í ár, og skal hetta endurtakast, so eru ÍF helst tær, sum eru næstar í so máta, so tað kundi kanska verið, at eitt óvæntað úrslit liggur her og bíðar.

Hjá monnunum verður neyvan talan um óvæntað úrslit, tá tvey av sterkastu liðunum fara at royna seg móti teimum báðum avgjørt veikastu.

Leygardagin kemur SÍ á vitjan í Hoyvíkarhøllini, sum sostatt skal hýsa tveimum tapandi steypafinalistum hendan dagin. Og eins og hjá kvinnunum, so eru tað gestirnir, sum eru stórfavorittar. Fram tykist í løtuni ikki at hava tað heilt stóra at bjóða, og at teir í seinasta umfarinum taptu fyri Fleyr borgar ikki fyri nakrari serligari styrki.

Tí hóast Fleyr við hesum fekk sín fyrsta sigur á árinum, so er tað helst lítið, sum teir kunnu gera fyri at steðga fuglfirðingum, tá hesir koma á vitjan. Eftir tapið í Klaksvík herfyri skal ÍF snøgt sagt syrgja fyri at vinna allar sínar dystir so greitt sum gjørligt, meðan teir so mugu vóna, at Mjølnir fer at missa onkra staðni. Og móti Fleyr eigur hetta at merkja ein 3-0 sigur til ÍF.



*Vinnarin av dystinum í Klaksvík um vikuskiftið fer eftir øllum at døma eisini at standa við gullkrónunum um hálsin um knappan mánað*

# VÍF kann rykkja

**Gloppið frá fjórða upp á triðja plássið verður fýra stig, um VÍF kvinnurnar vinna sín dyst sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í grundspælinum vann StÍF óvæntað á VB, men nú tær í Vági aftur hava allar leikarar tøkar, tykist vandin fyri eini endurtøku av hesum at vera ógvuliga fjarður*

Eftir at dysturin millum Søljuna og Kyndil varð framskundaður til hóskvøldið, eru bert tveir dystir á skránni í bestu kvinnudeildini hetta vikuskiftið.

Steypavinnararnir og oddaliðið úr Stjørnuni hevur frí, soleiðis at hini liðini koma ájavnt teimum í dystum, og alt bendir á, at tað bert verður eitt stig á muni í oddinum eftir vikuskiftið

VB eru nevnliga greiðir favorittar, tá tær leygardagin fara at takast við StÍF í Vági. Júst í hesin dystinum misti VB annars eitt sera óvæntað stig, tá tær uttan útlendingar hittu StÍF í grundspælinum, men við fullari styrki er lítið at ivast í, at VB tekur sær av øllum hesaferð.

### VÍF eftir silvurinum

Í Havn dystast Neistin og VÍF, og her fer tað helst at vísa seg, hvørt Neistin hevur format til at hanga í oddinum ella ikki.

Undan hesum dystinum er bert eitt stig, sum skilir liðini bæði, men tað hava tó alla tíðina verið greiðar ábendingar um, at Neistin má finna seg í standa onkra staðni í ongamannalandið. Skulu tær ikki tað, so er neyðugt við einum sigri sunnudagin, men hinvegin fer VÍF uttan iva at gera sítt til, at stigini skulu koma við til Vestmanna. Gullið tykjast tær ikki at náa, men megnar liðið at venda eftirverandi uppgerðunum móti Stjørnuni og VB til egnan fyrimun, so tykist silvurið í øllum førum vera sera nær.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 481 | 364 | 117 | 21 |
| 2 VB | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 453 | 345 | 108 | 18 |
| 3 VÍF | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 439 | 357 | 82 | 15 |
| 4 Neistin | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 432 | 390 | 42 | 14 |
| 5 StÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 381 | 440 | -59 | 7 |
| 6 Søljan | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 321 | 431 | -110 | 4 |
| 7 Kyndil | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 280 | 460 | -180 | 1 |

(Dysturin, Søljan-Kyndil, er ikki tikin við í uppgerðini)

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 381 | 348 | 33 | 13 |
| 2 Neistin | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 378 | 343 | 35 | 12 |
| 3 StÍF | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 316 | 307 | 9 | 9 |
| 4 VÍF | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 345 | 326 | 19 | 8 |
| 5 KÍF | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 324 | 375 | -51 | 5 |
| 6 H71 | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 314 | 359 | -45 | 4 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 15 | 12 | - | 3 | 39 | 12 | 27 | 16 |
| 2 Mjølnir | 15 | 12 | - | 3 | 39 | 14 | 25 | 16 |
| 3 Dráttur | 15 | 8 | - | 7 | 31 | 26 | 5 | 12 |
| 4 ÍF | 15 | 6 | - | 9 | 22 | 30 | -8 | 8 |
| 5 KÍF | 14 | 5 | - | 9 | 19 | 34 | -15 | 5 |
| 6 Fleyr | 14 | 1 | - | 13 | 7 | 41 | -34 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 12 | 11 | - | 1 | 33 | 8 | 25 | 15 | |
| 2 ÍF | 12 | 10 | - | 2 | 32 | 9 | 23 | 13 | |
| 3 SÍ | 12 | 6 | - | 6 | 23 | 20 | 3 | 8 | |
| 4 Fram | 12 | 2 | - | 10 | 9 | 31 | -22 | 2 | |
| 5 Fleyr | 12 | 1 | - | 11 | 5 | 34 | -29 | 2 | |